**VIÐMERKINGAR**

# Búskaparliga gongdin

**- viðmerking til landsstýrismannin í fíggjarmálum**

**Reidar Nónfjall**



Í sambandi við blaðgrein um almenna búskapin uttan mál og strategi, vísir Bárður Nielsen landsstýrismaður í fíggjarmálum á, at arbeiðsloysið í Føroyum er lágt í mun til onnur lond, og at Føroyar hava avlop á gjaldsjavnanum. Alt gott um hetta, men verður farið afturum hesi tølini sæst, at búskaparliga gongdin ikki er nøktandi.

**Arbeiðsloysi**
Arbeiðsloysið í Føroyum er umleið 4%. Samanborið við onnur lond er arbeiðsloysið í Føroyum ikki serliga lágt – forsagnir fyri 2005 um arbeiðsloysi vísa, at tað td. verður 5,7% í Danmark, 5,3% í Svøríki og 4,1 % í Norra.

Arbeiðsloysi er ikki eitt ókent fyribrigdi í Føroyum og føroyingar hava gjøgnum tíðirnar verið noyddir at flutt til onnur lond at fáa sær arbeiði. Í nøkrum førum eru hesi fólk ongantíð vend aftur til Føroya at búgva, meðan onnur eru vend aftur.

Munurin á fyrr og nú er kortini, at fólk eru sera væl upplýst um, hvar tey kunnu fáa sær eitt trygt og spennandi arbeiðspláss og harafturat kunnu tey brúka sín lærdóm og vitan á einum globalum arbeiðsmarknaði. Fleksibilteturin og mobiliteturin í arbeiðsmegini er sostatt nógv størri enn fyrr.

Arbeiðsloysið í Føroyum sær út til at gerast permanent fyri nakrar bólkar av arbeiðsfólki, sum annars ikki fara av landinum at fáa sær arbeiði, vegna aldur, vantandi førleika ella arbeiðsloysi í teimum londum, har tey kundu ynskt at fara til. Hetta slag av arbeiðsloysi, sum er komið til Føroya er kanska eisini eitt tekin um, at vit ikki megna kappingina innan okkara tradtionellu framleiðslu. Spuringurin er eisini, um ikki arbeiðs-loysisprosentið fer at hækka vegna tað, at arbeiðsmegin minkar, tvs. væl útbúgvin arbeiðsmegi er flutt ella í størri mun fer at flyta til onnur lond at búgva og arbeiða.

Er arbeiðsloysisprosentið í Føroyum lægri enn í norðanlondum, av tí, at vit útflyta okkara arbeiðsloysið til Danmark, Norra o.o. lond. Kunnu vit rokna við, at arbeiðsloysisprosentið knappliga fer at hækka munandi, tá tað almenna fer undir neyðugar sparingar á fíggjarlógini og tað fer at raka tað almenna sjálvt og avleiddar vinnur.

**Gjaldsjavnin**
Gjaldsjavnin vísir handilsliga og fíggjarliga millumverandi millum Føroyar og útlond. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum vísir á, at gjaldsjavnin gevur avlop og er hetta eftir hansara meting eitt tekin um, at føroyski búskapurin hevur tað gott. Eg skal royna at argumentera fyri, at støðan á gjaldsjavnanum møguliga er eitt tekin um tað øvugta.

Til samanberingar kann nevnast, at danir mittskeiðis í 1980´unum høvdu stór hall á gjaldsjavnanum. Tað vísti seg, at stóra hallið á danska gjaldsjavnanum stavaði serliga frá innflutningi av hátøkni, ídnaðarmaskinur og vinnuligari nýskapan av øllum slag og var við til at styrkja kappingarføri og skapa nýggjar vinnur. Sostatt var tað, sum veruliga hendi, at danska vinnan gjørdi stórar enduríløgur og nýíløgur. Eftir nøkrum árum ekporteraði Danmark seg úr búskaparligari stagnatión og síðan gav danski gjaldsjavnin avlop. Hetta dømið vísir m.a., at fyri at skapa inntøkur muga avhaldast útreiðslur (gera íløgur) - kommersielt sæð er neyðugt, at hvør króna í út-reiðslum gevur meira í inntøku uppá longri sikt.

Spurningurin er, hvat liggur aftan fyri positiva gjaldsjavnan hjá Føroyum. Er tað soleiðis, at innflutningurin av framleiðslutólum til nýggjar vinnur og vinnuliga nýskapan á landi og sjógvi, er minkaður ella steðgaður? Uppá longri sikt fer henda gongdin ikki at skapa nýggjar vinnur, styrkja kappingarføri og geva avlop í handlinum við onnur lond.

# Er fólkaræði reduserað til politiskar rossahandlar?

**Heidi Petersen**
*løgtingskvinna*



**Miðnámsskúlin í Suðuroy**
Miðnámsskúlin varð fluttur úr Vági til Porkeris/ Hovs. Hetta varð gjørt

- hóast allar sakligar grundir vóru fyri at byggja hann á byggiklára stykkið í Vági
- hóast lokalu myndugleikarnir vóru ímóti hesari flyting
- hóast tað kemur at kosta skattagjaldaranum tíggjutals milliónir krónir meira
- og hóast at kalla allir løgtingslimir sóu skilaloysið í at flyta skúlan, so samtyktu teir kortini at gera hetta.

Hví? Vit frá andstøðuni spurdu og fregnaðust eftir, hvør orsøkin var til hesa skilaleysu flyting, men vit fingu onki svar — ongi argument, ongar sakligar grundgevingar. Hvørki frá landsstýrismanninum ella frá løgtingslimum í samgonguni. Sagt varð, at hetta var ein politisk avtala, og løgmaður tagdi.

**Rækjustuðulin**
Løgtingi samtykti at veita rækjuvinnuni stuðul. 20 mió. kr. av skattaborgarans peningi varð fluttur beinleiðis í lummarnar hjá nøkrum fáum reiðarum.

Grundgevingarnar fyri at lata stuðulin vóru konstruerað argument, sum kanska fá í samgonguni trúðu uppá - og ikki øll atkvøddu fyri. Flokkar, ið fóru til val upp á ikki at veita rakstrarstuðul til vinnulív, atkvøddu fyri. Flokkar sum fóru til val upp á ein liberalan vinnulívspolitikk, atkvøddu eisini fyri.

Vórðu hesir flokkar spurdir um hví, var svarið tað sama: Vit halda hetta er ikki so heppið ella rætt, men hetta er ein politisk avtala, og tær halda vit - men løgmaður tagdi.

**Uttanríkispolitiska heimildarlógin**
Størsta broyting í viðurskiftunum við Danmark síðni heimastýrislógina varð løgd fram langt eftir seinasta framløgudag í tinginum. Lógarbroytingin varð skundað ígjøgnum eina viðgerð, har ongin fekk høvi at kanna og útgreina, hvørjar avleiðingar henda lóg fekk fyri Føroya fólk og føroyska fókaræðið.

Føroya fólk slapp ikki at taka støðu til hesa lóg, sum hevur so prinsipiellan týdning fyri sambandið millum Føroyar og Danmark.

Vit spurdu, hví tað var neyðugt at leggja tey donsku ríkislógartilmælini fyri tingið. Nærum allir løgtingslimirnir hildu tað vera óheppi, men . . . .

Tá spurt varð, hví hetta skuldi skrumblast ígjøgnum, var svarið hitt sama: Hetta er ein politisk avtala, og løgmaður hevur longu góðtikið lógina mótvegis dønum.

**Hvar er fólkaræðið?**
Hvussu hava fólkaræðiligu mannagongdirnar í hesum málum verið?

Hvar er gjøgnumskygni í førda politikkinum?

Hvar er opinleikin mótvegis fólkinum og tey sakligu argumentini?

Hvussu kunnu andstøðupolitikkar og borgarar í landinum fyrihalda seg til politiskar avtalur, sum ongin veit um? Avtalur, ið eru gjørda handan læstar dyr!

Hvussu hevur tað almenna kjaki tað, tá málini koma fram, eftir at avgerðirnar eru tiknar?

Hvussu skal fólkaræðið og áhugin fyri samfelagnum, vit liva í, yvirliva í einum landið, har hvørki politikkarar ella fólkið fær høvi at vera við í orðaskiftinum um øll samfelagsmál?

**Hevur sitandi løgmaður - sum einaferð hevði gjøgnumskygni og opinleika sum sítt eyðkenni - reduserað fólkaræðið til politiskar rossahandlar?**

# Nýggj og víðari heildarætlan

**Jógvan Arge**
*Formaður í býarskipanarnevnd Tórshavnar Býráðs*



Tann nýggi kommunubygnaðurin í Suðurstreymi krevur, at Tórshavnar Býráð leggur nýggjar ætlanir. Tann heildarætlan, sum í fjør varð løgd fyri menning av býnum komandi 25 árini, er fyri ein part óaktuell í løtuni.

Hetta kemst serliga av, at Kirkjubøar kommuna er løgd saman við Tórshavnar kommunu. Tað hevur við sær, at Tórshavnar kommuna hevur til taks eitt nógv størri lendi, enn hon hevði frammanundan, tá mark var millum gomlu Argja kommunu og Kirkjubøar kommunu.

Nú er hetta kommunumark burtur, og Tórshavnar kommuna fevnir um allan Suðurstreym - og Kollafjørð.

Tá heildarætlan varð gjørd í farnu setu, varð valt ikki at hava lendi vestanfyri Tórshavnar kommunu við í huganum, tá plánlagt varð. Tað merkti aftur, at meginparturin av menningini av miðstaðarøkinum við t.d. bústaðarøkjum, vinnuøkjum og trivnaðarøkjum varð ætlaður í Hoyvíkshaganum - tí lítið var at dúva upp á vestanfyri.

Hesin veruleikin er broyttur í dag. Nú finst minst líka nógv lendi vestan fyri sum norðanfyri, og í endurskoðanini av heildarætlanini, sum býráðið nú einmælt hevur sanmtykt, er høvuðssteningurin at fáa javnvág í framtíðarútbygginginga og meta um, hvussu teir nýggju møguleikarnir kunnu gagnnýtast til frama fyri kommununa og trivnaðin hjá borgarunum. Miðast skal samstundis eftir, at trivnaðurin og menniskjað verða í fokus.

Arbeiðið at endurskoða og víðka heildarætlanina er í tveimum liðum.

Í fyrra liðinum verður dentur lagdur á at raðfesta bústaðar- og vinnuøki í Vesturbýnum og økinum hjá gomlu Argja Kommunu við hartil hoyrandi møguleikum fyri trivnað við frílendum, spæliplássum, gøtum, ítróttarvøllum/hallum o.l. eins og atkomumøguleikum við vegum og brúm v.m. Miðað verður eftir, at hesin parturin verður liðugur til framløgu í oktober í ár.

Mett verður, at ein stórur partur av hagtalsliga grundarlagnum undir teirri ætlaðu endurskoðanini liggur í tí tilfari, sum hesi seinastu árini er fingið til vega og gjøgnumarbeitt í sambandi við ta heildarætlanina, sum býráðið samtykti í 2004.

Annar liðurin verður at gera uppskot um og ætlanir fyri, hvussu Tórshavnar kommuna kann skipa og nýta tær stóru víddir, sum kommunan er vaksin hesumegin Reynið við samanleggingini við Kirkjubøar kommunu. Her kann talan vera um øki bæði til trivnaðarendamál, bústaðarendamál, vinnuendamál o.a. Ætlanin er at hava hendan partin av arbeiðnum lidnan tíðliga í 2006.

Settur er ein stýringarbólkur við trimum limum úr byggi- og býarskipanarnevndini, býararkitektinum og býarverkfrøðinginum. Byggi- og býarskipanarnevndin verður javnan tikin við í ráðum, og ætlanin er eisini at skipa fyri dialogi við almenningin, áðrenn tann endurkoðaða og víðkaða heildarætlanin verður løgd fyri býráðið til endaliga samtykt.